# **MBM Búrøkt** eina vitjan verda

**MBM Búrøkt hava í nýggja bygningi-num stóran handil við vørum til land-búnaðin, so sum vørur til ross, seyð, hundar, kýr og m.a., og eisini slái-maskinur, traktorar, plenuklipparar, ar-beiðsklæðir og ymisk amboð**

**HANDIL**
**Dagfinn Olsen**
dagfinn@sosialurin.fo

MBM er eitt lutafelag, sum varð stovnað tann 25. oktober 1977 undir navninum Mjólkarvirki Búnaðar-manna. Mjólkarvirkið í Hoyvík var byrjanarskotið til Meginfelag Búnaðarmanna. Tað fór undir at framleiða tann 1. apríl 1980. Navnið varð síðan broytt til Meginfelag Búnaðarmanna, stytt MBM.

MBM var eina tíð í 4 deildum: tveimum framleiðsludeildum og tvei-mum innkeyps-, sølu- og tænastu-deildum. Í dag koyrir virkið í tveimum deildum, einari framleiðslu- og einari søludeild.

Harafturat kemur leiðsla og marknaðarførsla.

Mjólkarframleiðarar eru lu-taeigarar í felagnum men hóast felagið er lutafelag, er tað ríkið sum eitt partafelag. Munurin er helst eigaraviðurskiftini, at bert mjólkar-framleiðarar kunnu eiga lut/part í felagnum og tá eftir mjólkarnøgd/kvotu.

## Bygdu nýggjan bygn-ing

Tá flutt varð í nýggja bygningin, var felagið lagað soleiðis, at tað eftir henda dag hevði tvær deildir, eina framleiðslu- og eina søludeild.

Framleiðsludeildin er Mjólkarvirkið, sum hevur verið síðani byrjanina við MBM.

Søludeildin, sum umfatar fóðursøluna, handilin og verkstaðið, kallast BÚRØKT.

Í 1997 varð ein útbygging gjørd, sum tvífaldaði gólvvíddina og framleiðslu-orkuna.

1987 fór MBM undir at keypa og selja kraftfóður, handilstøð o.a. til landbúnaðin. MBM-Fóður hevði lein-gi heimstað á bryggjuni í Kollafirði, men eisini var fóðursøla á Mjólkar-virkinum í Hoyvík og hjá ymiskum umboðum kring landið. Eisini var og er handlað við amboðum og útgerð til húsdjórahald.

Í januar 2003 brann fóðurbyg-ningurin í Kollafirði í grund og eftir brunan húsaðist deildin á Búnaðardeplinum í Kollafirði í 2 ár, inntil flutt varð til Hoyvíkar.




MBM Búrøkt hava í nýggja bygn-inginum stóran handil við vørum til landbúnaðin.

- Í úrvalinum hava vit vørur til Ross, seyð, hundar, kýr og m.a., og eisini sláimaskinur, traktorar, plenuklipparar, arbeiðsklæðir og ymisk amboð.

## Gávuhugskot

Eitt sindur av hvørjum er millum maskur og útgerð til teirra, ið fáast við landbúnað og djór, og tað er óivað eitt gott hugskot at hyggja innar hjá MBM Búrøkt, tí har ber heilt víst til at finna røttu gávurnar til teirra, ið fáast við slíkt, og har er veruliga ymiskt, ið kann tendra ljós í eygunum á bóndanum, húsbónda-num, og óivað so mongum øðrum eisini.

MBM Búrøkt hevur ment seg og er avgjørt eina vitjan verda.










